Sílið 20 sekund undan øllum hinum

Havnargentur í nýggjum báti vunnu mest sannførandi sigurin av øllum í norðoyarstevnu kappróðrinum

5–MANNAFØR GENTUR

Jóannes Hansen

Í fjør sótu klaksvíksgentur í nýggjum báti. Tá var eingin ivi í øllum róðrinum uttan á ólavsøku. Genturnar umborð á Fípuni Føgru vóru nógv tær stinnastu.

Á norðoyarstevnu í ár sótu havnargentur í nýggjum báti. Og tað var eingin ivi. Tær umborð á Sílinum vundu burturúr kappingarneytunum. Talan var um størsta róðurin av øllum. Og eingin stóð Sílinum kurl. Tær fingu besta startin, tær løgdu seg beinanvegin framum allar hinar bátarnar, og munurin aftur til Fípuna Føgru og hinar kappingarneytarnar bara øktist. Tá Sílið kom á mál, høvdu tær umborð á Fípuni Føgru einar sjey bátslongdir eftir at rógva, og frá tí at Sílið kom á mál, og inntil tær umborð á Broddi úr Sumba komu á mál gingu næstan tveir minuttir! Ei undur í at onkur helt fyri, at tað kundi næstan sæð soleiðis út, sum um Broddur hevði róð úr Sumba og norður til Klaksvíkar.

Goymdu seg ikki

Tá fyrsti kappróðurin á árinum var á Skála næstsíðsta vikuskifti, var einki at síggja til Sílið. Men bátsformaðurin Inga Thorkildshøj avsannar, at tað var av taktiskum áðum, at tær goymdu seg fyri kappingarneytunum:

– Nei, tað gjørdu vit ikki. Tað lá ikki fyri hjá onkrari av okkum at rógva á Skála, og so gjørdu vit av ikki at taka lut. Vit vónaðu, at vit fóru at hava møguleika at vera við í kappingini um fremsta plássið í Klaksvík, men vit høvdu sjálvandi ikki roknað við, at munurin fór at verða so stórur aftur til hinar bátarnar, sum hann vísti seg at vera. Vit vóna at vinna fleiri róðrar, men vit rokna ikki við, at tað fer at verða eins lætt, og tað var hesa ferð, heldur Inga Thorkilshøj, sum situr á lærinum í bakborði umborð á Sílinum.

Sammett við manningina á Sílinum í fjør so eru tríggjar nýggjar við í ár – róðursmaðurin og so tvær aðrar. Men talan er fyri tað mesta um roynt fólk. Bara ein av manningini á Sílinum hevur ikki róð kapp áður. Í miðal hava hinar róð eini trý ella fýra ár.

– Hóast tær flestu okkara hava róð rættuliga nógv, so hava vit ongantíð áður roynt at vinna. Tí vilja vit vinna, og eg haldi, at tað hevur eitt sindur at siga, heldur bátsformaðurin.

Nýggja Sílið varð flotað 25. apríl. Tað er vanligt, at bátarnir hjá Havnar Róðrarfelag verða flotaðir henda dagin. Manningarnar hava oftast vant nakað frammanundan, at bátarnir verða drignir úr neystinum, og tað tykist sum um tað hevur hilnast væl hjá Sílinum.

Hvussu væl tað fer at hilnast á Skálafjarðarstevnuni fæst at síggja annan leygardag. Tað eru nógvar manningar, sum vilja bjóða Sílinum av. Hesa ferð var talan ikki um serliga kapping. Fípan Fagra var klárt nummar tvey, Ørnin var klárt nummar trý, og Blikur, sum vann ólavsøkuróðurin í fjør, var klárt nummar fýra.

Einki er at ivast í, at onkrar av hesum manningunum ætla at bjóða Sílinum av, men tað skal nógv til, áðrenn tað fer at eydnast. Sjey bátslongdir frá ti fremsta og til tann næstfremsta er næstan óhoyrt. Men næstu ferð fara bátarnir aftur at liggja stavn um stavn, tá startskotið fer at ljóða á Skálafjørðinum.

Gentumanningin á Sílinum vant burtur úr øllum hinum, og fagnaðurin var sjálvandi øgiligur, tá tær vóru greiðar um úrslitið

Mynd: Jens Kristian Vang

Páll Fangi var sær sjálvum líkur

Hesa ferð vóru tað menninir í Klaksvík, ið lyftu tunga arvin, sum bátsnavnið leggur á tey, sum manna bátin

6-MANNAFØR MENN

Jóannes Hansen

Fáur man hava verið sum Páll Fangi í kappróðri. Søgnin sigur, at hann megnaði at rógva ímóti einari heilari manning. Men so skal leggjast afturat, at teir, sum róðu ímóti honum, ikki høvdu serligan vilja at fáa hann aftur.

Í fjør var nýggi Páll Fangi hjá Klaksvíkar Róðrarfelag ofta í fremstu røð. Tá vóru tað kvinnurnar, sum stóðu fyri góðu avrikunum og vístu viljan at vinna.

Leygardagin vann Páll Fangi aftur. Men hesa ferð vóru tað menninir, sum stóðu fyri avrikinum og vístu serliga viljan, sum skal til.

– Vit hava ikki loyvi at skeita til síðuna. Men eg skal siga akkurát sum er. Eg lúrdi, og eg dugdi at síggja, at vit vóru væl við. Men eg dugdi ikki at síggja, um vit vóru fremstir. Í mínum eygum fingu vit góða kapping frá Gongurólvi, og Smyril hótti okkum av álvara, tá vit nærkaðust málinum. Aftanaá hava vit skilt á lagnum, at hann kanska var frammanfyri okkum eina løtu. Men vit vunnu, og tað er sera hugaligt. Vit vóru í hvussu so er eina hálva bátslongd frammanfyri Smyril, tá vit komu á mál.

Hetta sigur Símun M. Kerlok í Klaksvík. Hann situr á toftini í stýriborði á Páll Fanga, og hann er bátsformaður.

– Vit roknaðu við, at Smyril fór at vinna. Hann lá vestastur. Tað vísti seg, at bátarnir undir Norðborg gingu so væl síðsta teinin, men vit kneykaðu teimum, og tað eru vit sera fegnir um, sigur bátsformaðurin.

At Páll Fangi hevði møguleika at vinna kom ikki púra óvart á manningina. Á Skála var Páll Fagni við monnum fremstur:

– Tað setti mót í okkum. Ta ferðina vóru vit fremstir beinanvegin. Hesa ferð gekk tað ikki so væl við teimum fyrstu tøkunum, men í síðsta enda gekk tað nóg væl, tíbetur.

Í fjør gekk tað ikki væl hjá Páll Fanga í fyrstu róðrunum, men tað batnaði, og bæði á vestanstevnu og á ólavsøku vóru teir næstfremstir.

Sammett við í fjør er manningin eitt sindur broytt í ár. Fýra av teimum, sum vóru við í fjør, eru aftur í ár umborð á Páll Fanga. Tveir hava ongantíð róð áður, og so er ein komin umborð, sum í fjør róði við Fípuni Føgru. Ein av teimum, sum róði við seinnapartin av kappingarárinum í fjør, er í ár farin umborð á Klaksvíkingin.

Tøtt kapping

Tað komu ongar almennar tíðir frá kappingini millum 6-mannafør við monnum. Teir høvdu trupulleikar við klokkuni. Men talan var um eina tætta og spennandi kapping, sum kundi boða frá, at tað fer at verða spennandi á Skálafjørðinum annan leygardag.

Smyril og Hvessingur vóru báðir heilt frammi og bjóðaðu av. Gongurólvur er nýggjur, og tað kann roknast við, at hann fer at standa seg uppaftur betur, og so plaga Sølmundur og Strálan oftast at standa seg væl í hesi kappingini. Strálan var FM vinnari bæði í fjør og í fyrraárið.

Talan var um ein sera harðan endaspurt, har bæði Smyril og Gongurólvur góvu vinnarunum av Páll Fanga harða kapping

Mynd: Jens Kristian Vang

Nýggir bátar í fremstu røð

Nýggi Argjabáturin vann í harðari kappingini við nýggja Kvívíkingin, meðan vinnararnir á Skála endaðu væl aftanfyri tveir teir fremstu

8-MANNAFØR

Jóannes Hansen

Menninir á Argjabátinum vóru sum vera man fegnir eftir sigurin á Norðoyarstevnu, og onkur leyp á bláman

MYND: Jens Kr. Vang

Í fjør var tað Nevið Reyða. Klaksvíkingar áttu nýggjan bát, og hann var sera sannførandi og vann FM heitið. Teir kiksaðu bara eina ferð. Tað var í Fuglafirði.

Á norðoyarstevnu leygardagin var Nevið Reyða ikki við í kappingini. Teir flestu av manningini eru farnir umborð á 10-mannafarið hjá klaksvíkingum. 8–mannafarið er ikki mannað í Klaksvík. Tað ljóðar, at tað møguliga skal mannast á Skálafjørðinum. Men hetta var ikki komið upp á pláss undan fyrstu FM kappingini.

Ein av manningini umborð á Nevinum Reyða í fjør luttekur eisini í ár í kappingini millum 8–mannafør. Høgni Jacobsen er fluttur í høvuðsstaðin, og hann er nú umborð á Argjabátinum.

Teir á Argjum plaga at standa seg væl í tí kappingini. Teir vunnu FM í 2000, og teir vóru eisini meistarar í 1998. Nú hava teir nýggjan bát, og fyrsta FM kappingin boðaði frá, at Argjabáturin fer at vera millum bestu boðini upp á FM heitið.

Ein annar nýggjur bátur, Kvívíkingurin, legði bragdliga fyri. Teir høvdu besta startin, teir fingu skutin framum Argjabátin, men tað var skjótt, at Argjabáturin tók Kvívíking, og tá bátarnir komu á 1000 metra málið var munurin vorðin ein hálv bátslongd. Men frástøðan gjørdist ikki størri enn tað. Fram við Kósabrúnni var talan um stóra kapping. Kvívíkingar bjóðaðu av, og teir settu onkra ferðina stavnin framum Argjabátin.

Men tá bátarnir komu á mál, var munurin tann sami, sum hann hevði verið á 1000 metra málinum. Argjabáturin vann við einari stórari hálvari bátslongd.

Knørrur, sum næstsíðsta vikuskifti var fremstur á Skála, endaði á triðja plássinum í Klaksvík. Hann var kanska hálva triðju bátslongd aftanfyri Kvívíkingin.

Nýggi Húsavíkingurin var næstaftastur, og gamli Kvívíkingurin ella Kvívíksbáturin var væl aftastur. Teir báðir aftastu bátarnir vóru so nógv aftanfyri hinar, at talan næstan var um róður í fleiri deildum. Munurin frá Argjabátinum og aftur til Kvívíksbatin var 55 sekund.

Gott tak á tí

Rúni Johannesen hevur í fleiri ár verið formaður umborð á Argjabátinum. Hann er ein av fleiri sera royndum rógvarum. Tveir av teimum, sum vunnu FM í 1998, eru framvegis umborð, og uppaftur fleiri eru við av teimum, sum í 2000 vunnu FM.

– Vit lógu eystastir. Í øllum vindinum høvdu vit trupulleikar at fáa fatur á fasta startinum. Men tá startskotið var latið av, kendu vit okkum hava gott tak á róðrinum. Tað var eitt sindur torført at meta um støðuna, tí teir, sum vit kappaðust við, vóru so langt burtur. Tá vit vóru komnir á mál, vóru vit kortini ikki heilt vísir í, at vit høvdu vunnið. Tí lætnaði tað, tá vit frá landi av fingu at vita, at vit vóru teir fyrstu um málið, sigur Rúni Johannesen.

Royndist nýggi báturin væl?

-Sámal Hansen hevur smíðað okkum ein sera góðan bát, sum vit eru stak væl nøgdir við. Tað ere nakað serligt at kappast í nýggjum báti. Men gamla bátin hjá okkum vóru vit væl nøgdir við. Tað er ikki óhugsandi, at vit kundu havt vunnið við honum í Klaksvík, men tað fáa vit ongantíð at vita.

Svimjilandsliðið til Hetlands

Mánamorgunin fóru nakrir ungir svimjarar til Hetlands við Norrønu, har teir skulu luttaka í eini kapping

SVIMJING

Stefan í Skorini

Tilsamans tólv svimjarar eru við í ferðalagnum, og teir skulu luttaka í eini kapping í Hetlandi, sum nevnist OSFS.

Hetta er ein kapping fyri svimjarar í aldrinum 12-15 ár, og svimjararnir eru úr Orknoyggjunum, Hetlandi og Føroyum.

Kappingin verður hildin annaðhvørt ár, og kappingarnar eru á 50 metra teinum. Kappingin er týsdagin og mikudagin, og svimjararnir koma heimaftur mikudagin.

Luttakandi svimjararnir eru allir á landsliðnum, sum hevur verið á venjingarlegu í Havn alt undanfarna vikuskiftið. Petur Heðin á Fløtti er við sum venjari.

Svimjararnir eru hesir:

Jón Absalonsen	HS
Per S. Hansen	Flot
Hanus Eysturdal	HS
Jákup Mohr	FS
Aksal Norðfoss	HS
Rúni K. Hansen	HS
Elisabeth Rasmussen	HS
Helga Djurhuus	HS
Lisbeth Joensen	HS
Karin K. Eysturberg	TS
Elida Bjarnadóttir	HS
Sunrid Kærbech	VS

Hesir svimjararnir fóru mánadagin til Hetlands, har teir skulu luttaka í eini kapping millum Hetland, Orknoyggjarnar og Føroyar

Triathlon aftur á skránni

Komandi sunnudag skipar Føroya Triathlon Felag - FTF - fyri næstu triathlon kappingini í ár. Kappast verður í sokallaða OL-teininum

Tíðindaskriv:

Kappingin sunnudagin er fjórða kappingin, ið FTF skipar fyri í ár, og er hetta samstundis fjórða kappingin í Grand Prix 2002 kappingini.

Kappast hevur verið tvær ferðir í Duathlon (svimjing og renning), og eina ferð í Sprint Triathlon. Hesuferð er so aftur triathlon á skránni, men nú verður teinurin væl longri.

Kappast verður í OL-teininum, og tá skal luttakarin svimja 1500 metrar, súkkla 40 kilometrar og at enda renna 10 kilometrar.

Svomið verður í Svimjihøllini í Gundadali. Súkklað verður frá svimjihylinum, oman eftir Eystara Ringvegi, til Kaldbak, inn aftur til Kaldbaksbotn, aftur til Kaldbak og so allan vegin aftur til Havnar, har skift verður í renniskógvar við Plantusøluna.

Runnið verður síðan yvir til Føroya Sparikassa Yviri við Strond og niðan aftur til Plantusøluna. Teinurin skal rennast tvær ferðir. Málið er við Plantusøluna.

Hetta er fjórða umfar av Grand Prix 2002 kappingini. Hjá monnum liggur Eli Christiansen á odda, og hjá kvinnum Katrin Sørensen.

Eli hevur vunnið sær eitt fjórðapláss og tvey triðjapláss, og hevur sostatt samanlagt 90 stig.

Katrin luttók ikki í fyrstu kappingini, men hevur síðan vunnið tí næstu og triðju kappingina. Katrin hevur samanlagt 80 stig.

Kappingin byrjar kl. 13 sunnudagin, og luttakarar skulu møta kl. 12.

Tilmelding fer fram hjá Evald Rasmussen á tlf. 31 65 52.